# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 29. oktober 2009




Simona Petersen og Valentina Suciu úr Stjørnuni royna at forða Corneliu Rimbu úr Tjaldri at sleppa fram at málinum

Mynd: Álvur Haraldsen

## Sum ein finala

– Okkara øgiliga góðu skjúttar, sum fingu tað at koyra sera væl, gjørdu munin í kvøld. Eg haldi eisini, at vit orkaðu betur at halda á, segði Elinbjørg Hammer úr Tjaldri eftir sigurin á Stjørnuni.

Hon helt, at dysturin var heilt øðrvísi enn teir tríggir undanfarnu, ið allir eru vunnir stórt.

– Tað er nógv øðrvísi at spæla so javnar dystir sum hetta, heldur enn dystir, har vit vinna nógv. Eisini mátin, vit seta okkum upp uppá, er heilt øðrvísi. Hetta er sum at spæla eina finalu, segði Elinbjørg.

**hil**

## Spældu ikki sum lið

– Vit høvdu ordiliga gott tak á teimum í fyrra hálvleiki, tá vit bæði spældu og vardu væl, men mitt í seinna hálvleiki góvust vit at spæla sum eitt lið og byrjaðu at koyra ein og ein, og tá kiksaði tað.

Tað staðfesti Durita Mikkelsen úr Stjørnuni eftir tapið í Runavík í gjárkvøldið, ið kortini ikki tók vónina frá henni um at fara allan vegin í Sunset-kappingini.

– Vit eru allíkavæl við gott mót, og vit skulu nokk taka Tjaldur aftur í Klaksvík, segði hon.

**hil**

### Tjaldur-Stjørnan 30-25 (13-13)

# Tjaldur tók fyrsta stikkið

**Enn er kappingin ung, men kortini gav dysturin í gjárkvøldið eina greiða ábending um, at Tjaldur og Stjørnan verða tey, ið koma at stríðast um gullið aftur í vetur. Og við sigrinum kann somuleiðis staðfestast, at Tjaldur í løtuni hevur munin**





Hilmar Jan Hansen


Fyrsta veruliga oddabrakið í Sunset-kappingini var í ítróttarhøllini í Runavík, har meistararnir úr Tjaldri tóku ímóti steypavinnarunum úr Stjørnuni. Sum vera man, var høllin fullsett, og umframt nógvar heimaáskoðarar, var talan um nógvar norðoyingar, ið høvdu leitað sær út á Skálafjørðin. Við øðrum orðum vóru karmarnir um dystin teir allarbestu.

Ikki kann heldur sigast annað, enn at bæði lið megnaðu at levera vøruna, tí talan gjørdist um ein dyst, ið var undirhaldandi alla tíðina, hóast hann bara var spennandi tríggjar fjórðingar av tíðini. Orsøkin til tað var, at tá seinni hálvleikur var hálvrunnin, leyp Tjaldur eftir lítlari løtu fýra mál fram um Stjørnuna, og tað var meira, enn klaksvíkskvinnur megnaðu at hála innaftur.

Fyrst og fremst var skotstyrkin avgerandi munur á liðunum, tí tær fýra rumensku hjá Tjaldri – Adina Petrea, Cornelia Rimbu og Marinela Patru – stóðu fyri 22 av teimum 30 málunum hjá heimaliðnum. Henda styrki sæst eisini aftur á toppskjúttalistanum, har Tjaldur eigur fýra av teimum 12 fremstu málskjúttunum í kappingini.

### Tjaldur tók yvir

Í fyrra hálvleiki var samanumtikið sera javnt, og ikki bar til at siga nakað um, hvønn veg dysturin kundi koppað. Eitt skifti var Tjaldur frammanfyri 11-7, men Stjørnan bardi seg upp á 11-11 og sá bara betur út, sum tað leið til hálvleiks. Serliga royndist Kristina Griksaite í Stjørnu-málinum sera væl, og tær løturnar, hon stongdi málið, lyfti tað beinanvegin spælið úti á vøllinum.

Stjørnan kom eisini betur frá byrjan í seinna hálvleiki, men eftir at hava vunnið sær leiðsluna 19-18, kom stígur í, samstundis sum Tjaldur setti meira trýst á ketlarnar og fekk skjúttarnar betur við. Longu miðskeiðis í seinna hálvleiki byrjaði at síggjast, hvønn veg tað kundi ganga, tá Stjørnan í einar 10 minuttir bara skoraði tvær ferðir, meðan Tjaldur skoraði sjey mál í hinum endanum.

Ímóti endanum vísti Guðrun í Lágabø fleiri ferðir síni kynstur, og tá Stjørnu-kvinnurnar royndu at sleppa fram við henni, vóru stengur og yvirliggjari fyri einar tríggjar ferðir. Heilt ímóti endanum fekk Stjørnan tríggjar útvísingar ímóti sær, og tá gjørdist einki fyri at venda dystinum, ið nú fullkomuliga lá í hondunum á Tjaldri.

Við sigrinum fekk Tjaldur staðfest, at liðið er minst líka væl fyri, sum tað var síðsta vetur, tá tað sum uppflytari kom heilt upp á ovastu rók og vann meistaraheitið. Hinvegin eigur Stjørnan óivað meira í sær, enn hesin dysturin vísti, so helst fáa vit fleiri góðar duellir aftrat millum liðini bæði, ið longu nú mugu metast sum finalufavorittar til várs.

## FAKTA

**Tjaldur-Stjørnan 30-25 (13-13)**
**10 min.:** 4-3
**20 min.:** 8-6
**30 min.:** 13-13
**40 min.:** 18-19
**50 min.:** 25-21
**Tjaldur:** Adina Petrea 12, Cornelia Rimbu 6, Marinela Patru 4, Elinbjørg Hammer 3, Annika Thomsen 3, Sarah Ann B. Thomsen 2
**Stjørnan:** Simona Petersen 8, Joan Midjord Djordjevic 4, Bára Skaale Klakstein 4, Una Olsen 3, Valentina Suciu 3, Edith Hansen 1, Hanna Mikkelsen 1, Maria við Neyst 1
**Brotskøst:** Tjaldur 6, Stjørnan 1
**Ávaringar:** Tjaldur 3, Stjørnan 3
**Útvísingar:** Tjaldur 2, Stjørnan 5
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

**Sunset-kappingin**

| | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |
| 1 | Tjaldur | 4 | 4 - 0 - 0 | 136 | 95 | 41 | 8 |
| 2 | Stjørnan | 4 | 3 - 0 - 1 | 123 | 86 | 37 | 6 |
| 3 | Neistin | 4 | 3 - 0 - 1 | 109 | 92 | 17 | 6 |
| 4 | VÍF | 4 | 1 - 0 - 3 | 91 | 124 | -33 | 2 |
| 5 | VB | 3 | 0 - 0 - 3 | 58 | 83 | -25 | 0 |
| 6 | StÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 60 | 97 | -37 | 0 |

**Máltindurin, hondbóltur**

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 49 (8) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 29 |
| Simona Petersen | Stjørnan | 26 (4) |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 26 (8) |
| Jacklin Durhuus | Neistin | 21 |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 20 (4) |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 18 |
| Liljan Durhuus | VÍF | 18 (3) |
| Marinela Patru | Tjaldur | 17 |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 15 |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 14 |
| Roxanna Bodirlau | StÍF | 14 (3) |
| Halla Midjord | VÍF | 12 |
| Rakul Augustinussen | Neistin | 12 (1) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 11 |